Sp/f Grannskoðaravirkið *INPACT*

*INPACT*

# FØROYA KOMMUNUFELAG

## KVÍVÍK

### ÁRSFRÁSØGN

### 2010

**AVRIT**

# INNIHALDSYVIRLIT

Síða

**Átekningar**

Leiðsluátekning ........ 2

Átekning frá óheftum grannskoðara ........ 3

**Ársroknskapur 1. januar – 31. desember 2010**

Rakstrarroknskapur ........ 4

Fíggjarstøða 31. desember ........ 5

Notur til rakstrarroknskapin ........ 6 - 7

Ognaryvirlit ........ 7

Sundurgreiningar til verkætlanir ........ 8

Nýttur roknskaparháttur ........ 9 - 10

**LEIÐSLUÁTEKNING**

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og samtykt ársfrásøgnina fyri 2010 hjá Føroya Kommunufelag.

Ársfrásøgnin er sett upp í samsvari við ársroknskaparlógina og galdandi roknskaparleiðbeiningar.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, soleiðis at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum og skyldum, fíggjarligu støðuni og rakstrarúrslitinum.

Ársfrásøgnin verður hervið løgd fyri ársaðalfundin til góðkenningar.

Kvívík, tann 31. januar 2011

Nevnd: Asbjørn Djurhuus, formaður | Jógvan K. Mørkøre, næstformaður | Jóhan Christiansen

Albert Ó. Ellefsen | Karl A. Olsen | Delmar Tausen

Dánjal J. Jakobsen | Hans J. Kallsberg | Erik Davidsen

Skrivari: Sveiney Sverrisdóttir

INPACT
INTERNATIONAL

## ÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

**Til stýrið í Føroya Kommunufelag**

**Átekning á ársfrásøgnina**
Vit hava grannskoðað ársfrásøgnina hjá Føroya Kommunufelag fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2010 við leiðsluátekning, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, nýttum roknskaparhátti og notum. Ársfrásøgnin er gjørd eftir ársroknskaparlógini.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársfrásøgnini**
Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera eina ársfrásøgn, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Henda ábyrgd ber í sær, at felagið støðugt hevur tað innanhýsis eftirlit, ið skal til fyri at ársfrásøgn kann gerast, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, at nýttur verður hóskandi roknskaparháttur, og at roknskaparligu metingarnar, sum gjørdar eru, eftir umstøðunum mugu ætlast at vera rímiligar.

**Grannskoðanin og ábyrgd grannskoðarans**
Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársfrásøgnina. Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi føroyskum grannskoðanarreglum, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársfrásøgnini.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørt verður tað arbeiði, sum skal til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársfrásøgnini. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársfrásøgnini, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innanhýsis eftirlitið, ið skal til fyri at felagið kann gera eina ársfrásøgn, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársfrásøgnin sum heild er gjørd.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2010 og av úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2010 samsvarandi ársroknskaparlógini.

**Ískoytisupplýsing**
Øll støðisogn felagsins er tikin úr ársfrásøgnini og víst til útveganarvirði í eini notu til frásøgnina. Sostatt vísir ársfrásøgnin á ognarsíðuni bert tøkan pening og lætt umsetiligar ognir.

Tórshavn, tann 31. januar 2011

**Sp/f Grannskoðaravirkið** ***INPACT***
løggilt grannskoðaravirki

Fróði Sivertsen
statsaut. revisor

## RAKSTRARROKNSKAPUR
**1. januar - 31. desember**

| | Nota | 2010 | t.kr. 2009 |
|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | 1 | **3.349.916** | **3.397** |
| Skrivstovukostnaður | 3 | -155.733 | -150 |
| **Bruttoúrslit** | | **3.194.183** | **3.247** |
| Fyrisitingarkostnaður | 4 | -1.597.300 | -1.436 |
| Starvsfólkakostnaður | 2 | -1.582.087 | -1.405 |
| **Rakstrarúrslit** | | **14.796** | **407** |
| Fíggjarligar inntøkur | | 3.202 | 4 |
| **Ársúrslit** | | **17.998** | **410** |

## FÍGGJARSTØÐA 31. DESEMBER

| OGN | 2010 | t.kr. 2009 |
|---|---|---|
| Limagjaldseftirstøður | 204.944 | 199 |
| Skuldarar | 34.535 | 152 |
| Millumrokning við verkætlanir | 83.395 | 7 |
| **Ogn í umferð** | **322.874** | **358** |
| **Tøkur peningur** | **1.001.911** | **1.054** |
| **OGN TILSAMANS** | **1.324.785** | **1.412** |

| SKYLDUR | | |
|---|---|---|
| Flutt úrslit, við ársbyrjan | 1.154.933 | 745 |
| Ársúrslit | 17.998 | 410 |
| **Eginogn** | **1.172.931** | **1.155** |
| Áognarar | 151.854 | 249 |
| Millumrokningar við verkætlanir | 0 | 7 |
| **Stuttfreistað skuld** | **151.854** | **257** |
| **SKYLDUR TILSAMANS** | **1.324.785** | **1.412** |

# NOTUR

| | 2010 | t.kr. 2009 |
|---|---|---|
| **Nota 1. Inntøkur** | | |
| Limagjald | 2.459.306 | 2.394 |
| Skeiðinntøkur | 12.500 | 151 |
| Okkara lív sum eldri | 93.926 | 117 |
| Kommunala arbeiðsgevarafelagið | 509.427 | 437 |
| Tryggingarinngjøld | 134.977 | 139 |
| Agenda 21 | 113.000 | 112 |
| Aðrar inntøkur | 26.780 | 47 |
| **Inntøkur tilsamans** | **3.349.916** | **3.397** |

| | | |
|---|---|---|
| **Nota 2. Starvsfólkakostnaður** | | |
| Fastar lønir | -1.114.527 | -943 |
| Samsýningar og eftirløn | -351.964 | -337 |
| Tímalønir | -71.582 | -80 |
| Sosialar skipanir v.m. | -44.014 | -46 |
| **Starvsfólkakostnaður tilsamans** | **-1.582.087** | **-1.405** |

| | | |
|---|---|---|
| **Nota 3. Skrivstovukostnaður** | | |
| Samskiftiskostnaður | -44.568 | -49 |
| Orka | -20.736 | -17 |
| Tryggingar | -17.658 | -18 |
| Skrivstovuvørur | -47.312 | -35 |
| Tænastur | -10.536 | -16 |
| Limagjøld o.a. | -4.042 | -4 |
| Viðlíkahaldskostnaður | -10.881 | -10 |
| **Skrivstovukostnaður tilsamans** | **-155.733** | **-150** |

| | | |
|---|---|---|
| **Nota 4. Fyrisitingarkostnaður** | | |
| Óbeinleiðis kostnaður | -16.444 | -9 |
| Ferðakostnaður | -187.556 | -238 |
| Fundarkostnaður | -212.008 | -216 |
| Ráðgevar | -131.591 | -158 |
| Aðrar tænastur | -125.012 | -73 |
| Stuðul, Agenda 21 | -218.000 | -165 |
| Vanlukkutrygging, skúlar | -135.923 | -139 |
| Kommunala arbeiðsgevara felagið | -570.766 | -437 |
| | **-1.597.300** | **-1.436** |

**Ognaryvirlit pr. 31. desember 2010**

| | Útveganarvirði |
|---|---|
| Felagshús í Kvívík | 1.720.150 |
| Skrivstovuinnbúgv | 175.000 |
| Telduútgerð og printara | 58.000 |
| Printiútgerð | 50.620 |
| Samskiftisútgerð | 10.086 |
| Onnur útgerð | 54.794 |
| **Útveganarvirði tilsamans** | **2.068.650** |

# SUNDURGREININGAR TIL VERKÆTLANIR

| *Verkætlan, KIMO* | 2010 | t.kr. 2009 |
|---|---|---|
| Samsýningar | 0 | -7 |
| Ferðakostnaður | -45.401 | -44 |
| Vørukeyp | -1.064 | -4 |
| | **-46.465** | **-54** |

| *Verkætlan, Agenda 21* | | |
|---|---|---|
| Inntøkur frá Agenda 21 | 113.000 | 113 |
| Stuðul til agenda 21 | -218.000 | -218 |
| **Úrslit frá agenda 21** | **-105.000** | **-105** |

| *Verkætlan, Okkara Lív Sum Eldri* | | |
|---|---|---|
| Inntøkur til OLE | 93.926 | 94 |
| Samsýningar | -125.613 | -88 |
| Ferðakostnaður | -40.012 | -57 |
| Ráðgevar | -25.093 | -9 |
| Vørukeyp | -20.810 | -3 |
| Grannskoðan FMA | -8.931 | -6 |
| Fundarkostnaður | -28.616 | -31 |
| **Úrslit frá OLE** | **-155.149** | **-99** |

| *Verkætlan, Forsight* | | |
|---|---|---|
| Inntøkur | 7.826 | 0 |
| Útreiðslur | -10.626 | 0 |
| **Úrslit frá Forsight** | **-2.800** | **0** |

## NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

Ársfrásøgnin hjá Føroya Kommunufelag fyri 2010 er greidd í samsvari við ásetingar fyri smærri fyritøkur í ársroknskparlógini og eftir galdandi roknskaparleiðbeiningum.

Roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til undanfarna ár.

### Alment um innrokning og virðisáseting

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkurnar innroknaðar í stigum, so hvørt tær eru vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar og niðurskrivingar.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva fyritøkuni fíggjarligar fyrimunir, og virðið kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr fyritøkuni, og virðið kann ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til útveganarvirði. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum greitt er frá niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða virðisásettar til amortiserað útveganarvirði, har ein støðug effektiv renta verður innroknað yvir tíðarskeiðið. Amortiserað útveganarvirði verður uppgjørt sum upprunaligt útveganarvirði frádrigið møguligan avdrátt, umframt ískoyti/frádrátt av akkumuleraðu amortiseringini av muninum millum útveganarvirði og áljóðandi virði.

Innrokningar og virðisásetingar taka hædd fyri tapum og váðum, ið vóru væntað við roknskaparlok, sum síðan eru sannað ella avsannað, innan framløguna av ársfrásøgnini.

Roknskaparliga virðið á immateriellari og materiellari støðisogn verður gjøgnumgingið árliga, fyri at staðfesta um ábendingar eru um størri virðisminkingar, enn tær, sum eru í regluligu avskrivingunum. Um so er, verður niðurskrivað til tað lægra endurútveganarvirði.

## RAKSTRARROKNSKAPURIN

### Inntøkur
Inntøkur felagsins eru allar inntøkur frá kommunum og felagsskapum sum er móttikið innan árslok.

### Rakstrarkostnaður
Rakstrarkostnaður fevnir um allan kostnað, sum knýtir seg til raksturin hjá felagsskapinum.

### Starvsfólkakostnaður
Starvsfólkakostnaður fevnir um allan kostnað, sum stendst av at hava fólk í starvi. Tað er lønar-, frítíðar- og efirlønarkostnaður og øll sosial gjøld.

### Aðrar rakstrarinntøkur og annar rakstrarkostnaður
Aðrar rakstrarinntøkur og annar rakstrarkostnaður fevna um inntøkur og kostnað, sum ikki hoyra til høvuðsraksturin hjá fyritøkuni.

### Fíggjarpostar
Fíggjarligar inntøkur og kostnaður eru rentuinntøkur og –kostnaður.

## FÍGGJARSTØÐAN

**Materiell støðisogn**
Grundøki og bygningar, framleiðslutól og maskinur, umframt onnur tól, rakstrargøgn og innbúgv verða tikin við til útveganarvirðið og beinleiðis avskrivað.

**Áogn**
Áogn er tikin við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Virðið verður niðurskrivað eftir møguligum tapsvanda.

**Skuld**
Onnur skuld, sum fevnir um vøru- og tænastuskuld verður tiknin við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virði.